# Norðoyatunnilin




ein stór skipasmiðja, sum lokkar unglingar í læru. Teir síggja størri í einari fastari inntøku á einum stórum arbeiðsplássi, enn at liggja og gronast millum stampar norður úr Eiðiskolli í illveðri og agnaskræpu. Teir hóma møguleikar fyri at fara víðari, á maskinmeistaraskúla, til installatør, og aðrar hand-verksútbúgvingar við yvir-bygningi. Nógv arbeiðspláss eru í Eysturoynni og hesi draga oyndfirðingar frá stamp-unum og í trygg og fjálg størv. Fiskivinnan verður drenað fyri arbeiðsmegi, sum verður sogin inn á meginøkið. Fólk fáa eisini eyguni upp fyri útbúgvingum á lærdum skúlum. Tey síggja, nú tey koma av bygd, at tey við útbúgving koma lættari til krónurnar enn tey ið bert hava tímalønina at halla seg til. Fleiri fara í framhaldsdeildina á Strond-um og síðan víðari til Havnar og út í heim. Tá ið tey koma aftur, er ikki pláss fyri teirra størvum í heimbygdini, undirritaði endaði í Hoyvík, og eri nú komin norðuraftur, umvegis Hellurnar, nú eg eri givin at jakstra nýggjheitir og havi sett meg niður sum rithøvundur ein part av árinum.

Sova klaksvíkingar í tímanum, so fer júst tað sama at henda í Klaksvík um nøkur ár, sum er hent í Oyndarfirði seinastu 38 árini. Eg haldi, at samanberingin er í lagi, tí til amerikanska forsetavalið kunnu teir rokna út eftir undanvalum í teimum smæstu statunum hvussu saml-aða valúrslitið verður.

### Svarti pensilin hvítnar

Nú var ongantið ætlanin at taka breiða svarta pensilin fram og køva alla vón hjá norðoyingum henda hátíðardag, og tað er heldur ongin grund til, tí seiggið er teimum innan Klakk. Eg haldi meg hava førleikan til at úttala meg um hetta, tí eg havi einki annað gjørt seinastu trý árini enn at kanna handilssøguna hjá klaks-víkingum í samband við mítt ævisøguverk um Kaj Johannesen, og hon er ein sólsøga og eitt eindømi í Føroyum. Síðan Klaksvíkin tók at mennast eftir at einahandilin varð avtikin miðskeiðis í 19. øld hevur verið arbeiði og menning í Klaksvík uttan slit. Har hava altíð búð slóðarar, sum hava dugað at funnið nýggjar leiðir. Tað eru so nógvir aðrir enn Kjølbro, sum hava roynt seg, hóast hann varð so nógv tann størsti. Summir hava riðið á skeiva hestinum og eru ikki hóraðir undan, aðrir hava megnað at ført virksemið við arbeiði til nógvar hendur víðari í mong ár. Og tað er framvegis nógv fólk í Klaksvík, sum hava rygg og evni.Tað er tó skjótt at missa fótafestið í hesum tíðum við alheimsgerð og miðstaðarsavnan.

Ein vísur amerikanari hevur sagt hesi sigandi orðini: “Um eg geri sum eg altíð havi gjørt, so verður tað sum tað altíð hevur verið.” At alt verður sum tað altíð hevur verið er tað sama sum afturgongd, tí onki stendur í stað, hvørki lív ella nakað annað. Sjálvt lívið gongur bara frameftir við kós móti deyðanum.

Eg hoyrdi herfyri ein klaks-víking siga nakað soleiðis: “Lat okkum taka okkum av fiskinum og lat so hinar (teir á meginøkinum) taka sær av hinum.” Hetta er ein ikki serliga vitug útsøgn. Fiskur sum vinna er bara í lagi so leingi hon gevur pengar, nógvar pengar, ikki bara at hóra undan. Gevur fiskur ikki pengar, so má ein finna upp á okkurt annað. Tað er ongin lóg sum sigur, at alt virksemið í Klaksvík skal snúgva seg um fisk, beinleiðis ella óbeinleiðis. Eg siti í hesum døgum á Hellunum og skrivi eina bók um tíð mína í Singapore 1996-1999. Hon kemur út í heyst. Arbeiðstittulin er “900 dagar í Lee Kuan Yew´s Singapore” Lee Kuan Yew hevur brúkt alt sítt lív til at reisa Singapore frá einum fátækum malayiskum býi til ein heimsins fjórríkasta samfelag, roknað eftir inntøku pr. íbúgva. Hann hevur sitið í 27 ár sum forsætisráðharri. Eg eri bergtikin av hesum gløgga manni. Tá ið Singapore fekk sjálvstýri í 1965, ella rættari varð tveitt út úr Malaysia, stóð Lee Kuan Yew og hansara flokkur einsamallur við einari millión fátækum kinsearum og eitt sindur av øðrum fólki. Tey fingu mettuna av smáhandli og av arbeiði í gummiplantagum. Í dag eru tríggjar milliónir íbúgvar í Singapore, gummiplantagurnar eru horvnar og stórur partur av fólkinum í Singapore livir av at framleiða og menna hátøkni. Ein fittur partur livir av pengavirkseminum í býnum. Hetta er slett ikki náttúrligt virksemi fyri fólkið í Singapore, men tey vóru noydd at ganga nýggjar leiðir, neyð lærir nakna kvinnu at spinna. Hvussu bar alt hetta til. Lee Kuan Yew og hansara menn hugsaðu ongantíð, at vit kunnu einki, tí teir á meginøkinum eru dugnaligari. Teir hugsaðu heldur, vit vilja verða minst líka dugnaligir og allarhelst enn dugnaligari enn okkara kappingarneytar. Og kappingarneytarnir eru serliga Japan, Hongkong, Suðurkorea og Taiwan. Í dag Kina rættuliga komið við í kappingina.

Uppskriftin hjá Lee Kuan Yew er einføld. Lat okkum skapa fortreytirnar fyri útlendskum fyritøkum, at og sannføra tær um, at tað er rætt at flyta teirra virksemi til okkum og lat okkum arbeiða hart. Hendan uppskrift hevur virkað fyrimyndarliga fram til denna dag og kundi verið ein fyrimynd hjá Klaksvík. Vónandi fer Norðoyartunnilin at for-skrekkja norðoyingar somikið, at teir fara at gera alt fyri at skapa virksemi í Norðoyggjum og hetta virksemi nýtist ikki bara at vera fiskur. Ongin spyr hvar pengarnir koma frá í reiðiligum arbeiði.

Tað er ikki óhugsandi at tey fara at sita norðuri á Viðareiði og menna telduskipanir til útflutnings, ella menna hátøkni á Norðtoftum. Og veðurfrøðilig tøkni sum vindmátarar kundi bæði verði samlað og royndarkoyrd í Norðdepli og í Hvannasundi, og sjálvandi við eini deild í Klaksvík til regnmátarar. Gentøkni í Svínoy, hví ikki?

Drúgva og eydnusama handilssøgan í Klaksvík hevur prógvað, at krút er í klaksvíkingum, nú mugu teir brúka ein part av hesum krútinum , so teir ikki hvørva í meginøkinum.

At enda má eg ikki gloyma Jógvan við Keldu. Eg viðgangi tað bart út. Hann er nógv meira framskygdur maður enn eg sjálvur. Stóð tað til mín, so hevði neyvan nakar tunnil verður skotin í gjøgnum í dag. Eg helt Jógvan við Keldu verða óðan í høvdinum, tá ið hann sum tann allarfyrsti alment fór at tosa um fast samband undir Leirvíksfjørð. Í dag síggi eg, at eg fór skeivur í mínum afturhaldni, og Jógvan við Keldu hevði rætt, hóast hann bæði varð spottaður og niðurgjørdur fyri sínar krystallkláru framtíðarvisiónir, tá ið hann kom fram við teimum fyri mongum árum síðan. Hetta er størsta politiska avrik Jógvan við Keldu hevur framt, hóast hann fekk fylgi seinni, tá ið fólk sóu, at ætlanin var gjørlig. Tillukku Jógvan við Keldu, tillukku allir norðoyingar.